# Funningsfjørður undir lupp

**Vísundafólk úr Føroyum og Danmark eru í løtuni í holt við eina umfatandi kanning av Funningsfirði. Kanningin, sum verður gjørd fyri SEV, skal lýsa hvørji umhvørvislig árin standast av, at áarvatnið frá vestara armi á fjørðinum nú verður leitt í Eiðisvatn og ikki í fjørðin**



*- Eitt sindur feskum áarvatni rennur altíð í ein fjørð. Feska vatnið er heldur lættari enn sjógvur. Tað er saltið í sjónum, sum tyngir hann. Áarvatnið blandast í ávísan mun við sjógvin, men tó so, at ovast í sjónum legst eitt lag, sum er heldur feskari enn restin av sjónum. Hetta feskara lagið er lættari er sjógvurin annars, og tað verður tí liggjandi í erva, greiðir Eilif Gaard frá*

UMHVØRVIÐ

*Jóanes N. Dalsgaard*

Tá yvirfriðingarnevndin í sínari tíð gav loyvið til vatnorkuútbyggingina hjá SEV í Norðureysturoy, var ein av treytunum, at SEV skuldi gjalda fyri framhaldandi lívfrøðiligar kanningar á Funningsfirði. Í apríl 2000 avgjørdi SEV, í samráð við Oljumálastýrið, at seta ein arbeiðsbólk at skipa fyri hesum kanningum. Í arbeiðsbólkin vóru vald umboð fyri SEV, Landsverkfrøðingin, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Havfrøðiligu Royndarstøðina í Kaldbak og fyri Fiskirannsóknarstovuna. Bólkurin valdi Eilif Gaard, lívfrøðing á Fiskirannsóknarstovuni, til samskipara av kanningararbeiðinum.

## Kanningarverkætlan í trimum pørtum

Kanningararbeiðið er býtt í tríggjar partar. Fyrst og fremst skal rákið á fjørðinum kannast. Hendan kanningin skal vísa, um minkaða ílátið av feskvatni í fjørðin hevur nakra ávirkan á vatnútskiftingina á fjørðinum. Ein annar partur snýr seg um dýralívið á botni, og tann triði parturin snýr seg um plantu- og dýralívið fram við sjóvarmálanum.

Sosialurin hevur sett seg í samband við Eilif Gaard, kanningarsamskipara, fyri at fáa at vita eitt sindur nærri um, hvat tað er, sum skal kannast, og hví. Eilif Gaard greiðir frá, at í fyrsta umfari verður høvuðsdenturin lagdur á at kanna streymviðurskiftini á Funningsfirði. Ílátið av feskvatni í ein fjørð kann hava avgerandi týdning fyri vatnútskiftið á fjørðinum og harvið fyri livilíkindini á fjørðinum sum heild. Fyribrigdi, sum talan er um, nevnist ein feskvatnspumpa.

## Feskvatnspumpan

Tað rennur altíð nakað av feskum áarvatni í ein fjørð, greiðir Eilif Gaard frá. Feska vatnið er heldur lættari enn sjógvur. Tað er saltið í sjónum, sum tyngir hann. Áarvatnið blandast í ávísan mun við sjógvin, men tó so, at ovast í sjónum legst eitt lag, sum er heldur feskari enn restin av sjónum. Hetta feskara lagið er lættari er sjógvurin annars, og tað verður tí liggjandi í erva.

Men av tí at meira feskvatn allatíðina rennur í fjørðin, verður hetta ovasta lagið trýst út av fjørðinum. Ovasta lagið er sum nevnt eitt bland av sjógvi og feskvatni, men meginparturin av hesum blandið er tó sjógvur. Lutfallið ímillum sjógv og feskvatn er kanska 1 til 100. Hetta merkir, at nøgdin av sjógvi, sum rennur út av fjørðinum, er 100 ferðir so stór, sum nøgdin av feskvatni, sum rennur í fjørðin. Hetta hevur aftur við sær, at sjógvur verður sogin inn í fjørðin í neðra, og eisini henda nøgdin er 100 ferðir so stór, sum nøgdin av feskvatni, sum rennur í fjørðin. Hetta er tað, sum nevnist ein feskvatnspumpa.

## Vindur og sjóvarfall

Um vatnútskiftið á einum fjørði verður drivið av eini feskvatnspumpu, hevur ílátið av feskvatni avgerandi týdning fyri vistfrøðiligu javnvágina í fjørðinum. Og av tí sum sagt er omanfyri sæst, at smáar broytingar í feskvatnsílátinum kunnu bera í sær stórar broytingar í vatnútskiftinum. Tí er tað av alstórum týdningi at finna fram til, í hvønn mun vatnútskiftið á Funningsfirði er drivið av eini feskvatnspumpu ella um aðrar kreftir eisini spæla ein leiklut. Hesar kreftir eru vindur og sjóvarfalsstreymur. Sum er, vita vísundafólkini ikki, hvønn leiklut hesar tríggjar kreftinar spæla fyri vatnútskiftið á Funningsfirði. At finna svar uppá tann spurningin sær Eilif Gaard, sum eina høvuðsuppgávu hjá bólkinum.

## Truplt at kanna í skiftandi veðri

Ymsir møguleikar eru til tess at finna hetta svarið. Ein máti er at gera nógvar einstakar mátingar ymsa staðni á fjørðinum yvir eitt longri tíðarskeið. Men trupulleikin við hesum framferðarhátti, sigur Eilif Gaard, er, at veðurlagið í Føroyum er so skiftandi. Hetta ber í sær, at sjálvt um heilt nógvar mátingar vera gjørdar, so verður trupult at vita, hví man fær eitt úrslit í dag og eitt annað í morgin. Tað er ógvuliga torført at siga, hvør orsøkin er til broytingarnar. Tað kann vera tí at vindurin er øðrvísi, tí tað regnaði í fyrradagin ella tí at sjóvarfallið ikki er tað sama.

## Teldumyndil í ger

Bólkurin hevur tí í staðin valt at gera ein teldumyndil, sum skal lýsa streymviðurskiftini. Bólkurin hevur biðið Dansk Hydraulisk Institut um at gera myndilin, og tað arbeiðið er komið nakað áleiðis. Eilif Gaard greiðir frá, at endamálið við at gera ein myndil er at síggja, hvussu tingini hanga saman. Tá myndilin er fingin at hanga saman, ber til at broyta t.d. feskvatnsílátið fyri at síggja, hvussu hetta ávirkar streymgongdina á fjørðinum. Á sama hátt ber til at síggja, hvussu nógv hinar kreftirnar - vindur og sjóvarfall - ávirka. Tá myndilin er liðugur verða stakkanningar gjørdar á fjørðinum fyri at kanna, um veruleikin er, sum myndilin sigur.

## Víðari kanningar

Um komið verður fram til, at feskvatnsílátið hevur ein ávísan týdning fyri rákið, so skal kannast, hvønn týdning hetta hevur fyri tær lívfrøðiligu tilgongdirnar inni á fjørðinum, tað verið seg gróður og dýr bæði við botnin, uppi í sjónum og í sjóvarmálanum. Havlívfrøðiliga Royndarstøðin í Kaldbak skal gera kanningar við botnin og uppi í sjónum, og Náttúrugripasavnið skal gera kanningar av sjóvarmálanum.

## Úrslit og frágreiðing

Tá kanningararbeiðið er liðugt um eini 5 ár skal arbeiðsbólkurin koma við eini frágreiðing. Men Eilif Gaard sigur, at so langt er arbeiði slett ikki komið enn. Í løtuni gongur tíðin við at savna tilfar, og tað er sum skilst ikki løtuverk. Eilif Gaard sigur tó, at hann væntar, at úrslitini frá streymkanningini vera tøk í hesum árinum.



Jancy Biskopstø Klein, leiðari á Sosialu Deild í Klaksvík:

# Vit tora ikki at taka ábyrgd



*Leiðarin á Sosialu Deild, Jancy Biskup Klein, hevur ta meining, at børn, sum líða undir ágangi, vanrøkt og misnýtslu, nærum ongan góðan eiga, sum veruliga loysir teirra trupulleika*

*Mynd: Jens K. Vang*

**– Ístaðin fyri at verja barnið, so verja tey vaksnu seg sjálvi frá uppílegging og ósemjum. Heilt erligt?! Hvat skulu vit við barnaverndum, sum ikki skilja støðuna hjá einstaka barninum, og sum ikki taka trupulleikarnar við rótini**

BARNAVERND

*Orð: Steintór Rasmussen*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Hon hevur eina greiða støðu til málið. Og hon eigur at vita, hvat hon tosar um. Dagliga verður hon konfronterað við tørvin hjá børnunum í kommuni. Heili 80 virkin barnaverndarmál eru til viðgerðar. Hóast ikki øll eru úr somu skuffu, so eru tungar sakir ímillum, sum rópa eftir serkønari og ábyrgdarfullari viðgerð.

Jancy Biskopstø Klein er leiðari á Sosialu Deild hjá Klaksvíkar Býráð. Áðrenn hon tók við starvinum, á sumri 2000, hevði hon starvast sum sosialráðgevi í Odense í nøkur ár.

– Eg má siga, at her í Føroyum arbeiða øll mestsum hvør í sínum lagi. Mín uppgáva er at fáa umsitingina at virka, men samstundis arbeiði eg innan fyri eitt óskipað øki og tingini hanga sjáldan saman. Ímeðan sosialmál í Danmark í stóran mun liggja úti hjá tí einstøku kommuni, so eru viðurskiftini nógv meira fløkt herheima. Og so haldi eg eisini, at tíðin langt síðani er farin frá politisk valdu barnaverndunum, har man ofta heldur velur penar borgarar enn óbúgvin fólk við fakligari vitan og førleika.

Jancy ásannar, at tað kann verða tungt at arbeiða, tá fólkini rundanum tað runda borðið ikki tosa sama mál. Ístaðin fyri at psykologurin, læknin og sosialráðgevin og onnur, sum hava rætta førleika skulu verja av og seta tiltøk í verk, so lata vit lagnuna hjá barninum upp í hendurnar á stýrimanninum, bókhaldanum og krambakvinnuni.

– Uttan at taka nakað frá teimum sum verða vald í barnaverndir kring landið, so meini eg heilt erligt, at hendan skipanin ikki tænir sakini hjá barninum. Eg skilji heldur ikki argumentið, tá tað verður sagt, at barnaverndirnar umboða tann menniskjaliga partin.

Ofta ána tey, sum eru vald í hesar nevndir, ikki hvat er best fyri barnið, og hvørjar lógarkarmar tey virka innanfyri. Tískil verða tiltøk bert sett í verk, tá støðan er serliga grell og farið er langt yvirum mark. Vit sløkkja kanska onkra hissini brand, men eru ikki nóg dugnalig at fyribyrgja, at eldur kemur í, sigur Jancy, sum í sínum yrki á Sosialu Deild ofta má smyrja seg við, at barnaverndir ikki altíð er samdar við tilmælum, sum fakfólk gera í einstøku sakunum, og at arbeiðið verður seinkað og tilvildarligt.

– Tað eru leikfólkini, tey sum manna barnaverndirnar, sum hava avgerðarrættin, men tað er langt frá altíð, at tey skilja ella góðtaka eitt tilmæli.

– Hetta er ikki meint persónligt, men eg haldi, at føroysk børn líða undir, at tey vaksnu ikki tora at taka støðu. Tað verður malið uttan um greytin, og ístaðin fyri at síggja trupulleikan í eyguni, so verður oftani tað blinda eygað vent til.

## Ongin veit av hvørjum øðrum

Leiðarin á Sosialu Deild hevur ta meining, at børn, sum líða undir ágangi, vanrøkt og misnýtslu, nærum ongan góðan eiga sum veruliga loysur teirra trupulleika. Øll draga hvør sína línu, og tað manglar tvørfakligt samstarv. Og hóast kritikkurin hevur fleiri móttakarar, so er tað einamest sjálv skipanin, sum skal lastast fyri, at ov lítið spyrt burturúr.

– Eg haldi, at øll sum arbeiða við børnum, m. a. heilsusjúkrasystrar, pedagogar og lærarar eiga at leggja seg eftir at skilja tað einstaka barnið. Í skúlanum hugsar lærarin fyrst og fremst um at læra barnið at lesa og skriva, men gloymir heildina. Hvussu barnið hevur tað aftan á skúlatíð viðkemur ikki skúlanum. Og sannleikin gerst tí oftani, at børn gerast vaksin, uttan at nakar hevur reagerað ella sett ítøkilig tiltøk í verk. Skipanin loyvir, at ongin hevur ábyrgd, og at øll senda trupulleikan víðari, sigur Jancy Biskopstø Klein, sum heldur, at rætt og rímiligt var, at Sosiala Deild varð kunnað, tá ið eitt nú lærarar ella heilsusjúkrasystrar vita av børnum, sum vantrívast ella eru offur fyri ágangi og misnýtslu. Og hon sigur víðari:

– Tað sum eg meini er at innsatsurin og vitanin eiga at verður samskipað og hava ein ábyrgdara. Í løtuni er tað so, at løgregla, skúli og Sosiala Deild kunnu arbeiða við sama máli, uttan at vita av hvørjum øðrum.

Ein nýggj barnaverndarlóg er fyri stuttum farin til hoyringar. Jancy dylur ikki fyri, at hon er ein av teimum, sum tekur undir við, at barnaverndarøkið eigur at verða eitt kommunalt málsøki, har kommunan hevur ábyrgd av trivnaðinum hjá tí einstaka barninum. Í nýggja lógaruppskotinum verður tó mælt til, at økið skal verða ein landsuppgáva, men hetta er eftir hennara tykki eitt skeivt prinsipp.

– Eg haldi, at tað er uppgávan hjá kommununi at taka sær av teimum, sum búgva á staðnum. Og her í Norðoyggjum eiga vit hava tað mál, at vit skulu kunna tæna øllum borgarum, óansæð hvørji korini eru hjá tí einstaka.

## Samfelagið svíkur

Jancy, sum hevur búð og virkað sum sosialráðgevi í Danmark, skilir væl tað fyrivarni, sum fólk annars hava í einum lítlum samfelag. At fólk ikki vilja leggja seg upp í viðurskifti hjá grannanum og næstringum. At fólk heldur vilja peika á trupulleikan enn at gerast partur av sakini.

– Eg haldi kortini ikki, at vit kunnu loyva okkum at vera líkaglað. Okkara mentan og trúgv byggir á næstrakærleika, men vit skáka okkum undan veruleikanum, sigur hon og vísur á, hvussu trupult tað er at finna pleygufamiljur til børn, sum hava eitt trygt og gott heim fyri neyðuni.

– Vit hava tað ótrúðliga gott í Føroyum, men kunnu kortini lýsa í fleiri vikur í bløðunum eftir plejufamiljum, uttan at nakar vísir áhuga. Fólk hava nóg mikið í sær sjálvum. Og soleiðis er støðan nógvastaðni í landinum.

Hóast føroyingar eru eitt ríkt fólk, har tey flestu hava yvirskot av plássi og matriellum ágóðum, so duga vit ikki serliga væl at taka okkum av hvørjum øðrum, tá ið veruliga á stendur, sigur Jancy Biskopstø Klein.

Hon hyggur at klokkuni. Tíðin er fokin avstað, og vit kundu helst prátað eina góða løtu afturat.

Hví tað framvegis ikki er nakað starv sum psykologur í kommununi. Og hví onki ítøkiligt er komið burturúr tosinum um at seta ein sosiráðgeva afturat. Um bíðilistan hjá dagrøktini, barnagarðar og familjuráðgeving. Men tíðin er komin hjá leiðaranum á Sosialu Deild at hugsa um sítt egna barn, sum bíðar í dagrøktini.